# Ferðasíðan hjá Sosialinum

62°N



# SKÍÐFERIA
## Í FRONSKU ALPUNUM

22. februar – 2. mars 2008







**Uppliva fronsku Alpunar í eina viku saman við familjuni ella vinum.**

**Tú hevur minnini fyri lívið.**

Farið verður til hugnaliga býin Avoriaz, ið liggur á fjallasíðuni við eitt stórt skíðøkið. Økið hevur liftu, ið skjótt flytir skíðfólki frá býnum til skíðøkið.

Eingin bilferðsla er í býnum. Bilar og bussar verða parkeraðir uttanfyri býin, og tí er staðið sera vælegnað til barnafamiljur, ið kunnu bólta sær uttan at vera í vanda fyri fronsku bilførarunum.

Les Portes du Soleil-økið hevur avbjóðingar bæði til roynda skíðarin og til tann óroynda. Brattasta skíðbrekkan í Alpunum, "Múrurin", er eitt gott tilboð til tann djarva. Tey óroyndu og varligu kunnu velja aðrar skíðbrekkur, sum ikki eru so brattar; bæði í Fraklandi og í Schweiz.
Avoriaz, og økið rundanum, hevur nógvar góðar matstovur. Eitt sera vælumtókt stað er "The Place", ið bjóðar uppá "afterski" við góðum, livandi tónleiki.
Gist verður í 2-rúmsíbúðum. Íbúðin hevur køk, stovu v/uppreiðing til 2 fólk, eitt kamar, baðirúm og balkon. Allir vanligir hentleikar eru, t.d tlf, sjónvarp og uppvaskimaskina.

**Íroknað prísin er:**
- Flogferð Vágar – Kastrup – Chambery og aftur v/ øllum avgjøldum
- Gisting í 2-rúmsíbúð í Avoriaz
- 6 daga liftkort
- Flutningur frá Chambery til íbúðina í Avoriaz
- Danskur ferðaleiðari

**Ikki íroknað:**
- Skíleiga uml. kr. 640,- fyri vaksin og kr. 340,- fyri børn
- Liftkort á heimferðardegnum kr. 250,-
- Ferða- og avlýsingartrygging
- Gisting í Keypmannahavn á út- og heimferðini. Hesum vilja vit tó fegin hjálpa við.

**Ferðaskrá:**

| | |
|---|---|
| 22. feb. Vágar – Kastrup | kl. 08.15 – 11.30 |
| 23. feb. Kastrup - Chambery | (um kvøldi, tíðir koma seinni) |
| 23. feb. Chambery – Avoriaz | við bussi, uml. 2 tímar 45 min. |
| 01. mar. Avoriaz – Chambery | við bussi, uml. 2 tímar 45 min. |
| 01. mar. Chambery – Kastrup | (um kvøldi, tíðir koma seinni) |
| 02. mar. Keypmannahavn – Vágar | kl. 15.20 – 16.35 |

Prísur
**Kr 8.499,-**
fyri hvønn í íbúð til 4 fólk
Børn 4-11 ár gjalda kr. 7.174,-
Børn 2-3 ár gjalda kr.6.249,-

**Fyrvarni verður tikið fyri prentvillum og príshækkingum*

Prísurin er treytaður av at 4 fólk deila íbúð



ATLANTIC AIRWAYS

62°N

Hoydalsvegur 17 • 100 Tórshavn
Tel: 34 00 00 / 34 00 60 • Fax: 34 00 11
booking@62n.fo
www.62n.fo